DAGSINS MEINING

Áhugaverdur málfundur

Dagarnar 27. og 28. august verða umleið 50 norðurlendskir málfrøðingar savnaðir til fundar í Havn. Talan er um tann árliga norðurlendska málfundin, sum hesa ferð verður hildin í Føroyum. Tað eru tær norðurlendsku málnevndirnar, sum skiftast um at skipa fyri fundi. Á fundinum hittast umboð fyri málnevndirnar í Norðurlondum. Umboð eru úr Danmark, Noregi, Svøríki, Finnlandi, Íslandi, Grønlandi og Sámalandi.

Í ár er tað Føroyska málnevndin, ið skipar fyri. Hetta er 51. árið, at hesin fundur verður hildin. Evnið fyri henda fundin er málnormering og málbroytingar. Tað er hugaligt, at slíkur fundur verður hildin her í Føroyum. Mál og málrøkt hevur, alt frá tí tjóðskaparørslan tók seg upp, verið ein týðandi táttur í føroyskari tjóðskaparligari menning. Í skúlum og á fróðskaparsetirnum verður gjørt eitt stórt og kanska mangan ótakksamt arbeiði fyri at menna føroyskt mál. Hetta arbeiðið eiga vit øll at viðurkenna.

Móðurmálið er ein so týðandi partur av okkara samleika sum tjóð, at einki eigur at verða spart til tess at styrkja og menna málførleikar hjá børnum og ungum og til tess at menna og styrkja móðurmálið. Tað er eisini neyðugt, at tær almennu Føroyar hava ein málpolitikk. Hetta hevur verið umrøtt á tingi, og er eisini samtykt. Hetta er gott. Men samstundis má ásannast, at vit føroyingar eru ómsamdir um, hvussu langt eigur at verða farið við málreinskan og orðasmíði. Vandi er fyri, at tað skrivaða málið og vísindamálið flyta seg ov langt frá talumálinum. Her ræður um at finna røttu javnvágina. Eisini er umráðandi, at vit hava eitt skrivað mál, sum øll kunnu læra. Her eru nógvir álvarsamir og áhugaverdir spurningar, og tað er neyðugt støðugt at hava eitt alment orðaskifti um øll hesi viðurskifti.Málfrøðingarnir hava í hesum høpi eina serstaka og stóra ábyrgd. Ein málráðstevna sum hendan, ið verður hildin seinni í vikuni, kann uttan iva stimbra áhugan fyri málpolitikki, málrøkt og málvísindum. Tað er tí sera gott og jaligt, at slík stevna verður hildin í Føroyum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

"Skríggið"!!

John Myllhamar

Viðmerking til Berg D. Joensen

Hóast eg ikki eri heitur fyri donsku biskuppunum, so havi eg eftir at samrøðan var gjørd við Sosialin, fingið at vita, at ein av teimum, biskuppurin á Fjóni, hevur verið inni á nøkrum av tí sama, at niðurleggja brúðarvígsluna í kirkjuni. Eg kenni annars ikki støðu hansara, ella hvussu hann hevur úttalað seg. Men so langt eru vit í hvussu so er samdir.

Annars, so ger Bergur D. Joensen prestur nakrar viðmerkingar til tað, sum eg segði við blaðmann á Sosialinum hin 24 august. Í nógvum av tí hann førir fram eri eg sjálvsagt samdur. Men hann sigur, at kirkjan skal halda fast. Eg veit ikki rættiliga hvat kirkjan skal halda fast um, tá ið tað snýr seg um vígslu og signing av hjúnum. Har er væl ikki nógv eftir at halda fast um. Eg dugi ikki at síggja nakra meining í, at somu menniskju fleiri ferðir ganga fram fyri altarið, at geva Guði og hvørjum øðrum lyftið um fylgiskap fyri lívstíð. Heldur ikki dugi eg at ímynda mær, at ta í framtíðini verður vent aftur til einaferð-gifting.

Luther, hóvast hann gjørdi eitt vígslurituel, metti, at brúðarvígsla var eitt borgarligt fyritakandi. Tí er lættari hjá okkara evangelisk luthersku kirkjuni, at leggja brúðarvígsluna niður. Var ta tann katólska kirkjan, hevði tað verið torførari, tí har er hjúnalagið eitt sakramenti (ein heilag gerð) altso eins heilagt og týðandi sum okkara dópur og altarborð eru. Var talan um at nomið við okkara sakramentir, so tosa vit um heilt onnur ting. Tey eru beinleiðis innsett av Jesusi. Men vit ganga ikki skriftini ímóti, við at leggja brúðarvígslu burtur, tí í Halgubók fáa vit einki at vita um hvar og hvussu tvey vóru gift. Einki bendir í hvussu so er á, at hetta fór fram í synagogum ella í templinum. Ikki heldur, at nøkur signing av hjúnalagnum fór fram av fyristøðumonnum í heilgidóminum. Vit vita bara, at maður og kona skulu giftast.

Og hvat viðvíkur hjúnavígslu av samkyntum, er at siga: Um vit halda at tann føroyska kirkjan kemur at standa sum eindømi í Europa, at fora fyri at samkynd vera vígd til hjún í henni, ja, so skulu vit nokk hugsa okkum um einaferð afturat. Líkamikið hvussu sterka leiðslu hon annars fær, so noyðist hon at geva eftir. Vit kenna tað frá Svoríki. Vit kenna tað frá Danmark. Fyrst verður gjørd lóg um skásett parlag, men vit halda kirkjuna uttanfyri, siga politikararnir. Tá ið so sjógvarnir hava lagt seg, verður lagt til brots fyri at taka næsta stigið - inn í kirkjurnar.

Tí er rættast at binda um heilan fingur, at kirkjan sum skjótast loysir seg frá øllum, sum hevur við vígslu og signing av hjúnum - og "hjúnum" - at gera. So kunnu fólk giftast og gifta (Matt. 24,38), uttan at kirkjan leggur sína signing til.

Hvør hevur ábyrgdina av skúlanum við Áir?

Óli J. Poulsen

Til avvarðandi myndugleikar, hvør tað so er.

Eg havi roynt at kanna hvør er hægsti myndugleiki. Eg havi fingið at vita, at tað er Kristina Larsen, hon er farin í orlov, rýmd frá eini søkkandi skútu, ið hon sjálv hevur borða hol í.

Næst henni er stýriforkvinnan Doris Hansen, hon greiðir mær frá, at skúlin byrjar aftur mánadagin tann 30. august 2004. Hon hevur lova mær bræv, ið váttar hetta, eg havi nú bíðað í næstan tríggjar vikur, men einki bræv er komið enn. Hon hevur sagt, at teir komu lærarnir koma at virka sum áður, eg havi spurt meg fyri, teir siga at teir einki vita enn, tað eru bert fáir dagar eftir til mánadagin, umt að er mánadagin 2004 ella 2005 – hvør veit.

Øssur av Steinum bleiv ákærdur millum annað at hava tikið næmingarnar til gíðslar, hvør hevur nú tikið okkum til gíðslar?

Mín spurningur er nær byrjar skúlin við Áir aftur, hvør verður skúlastjóri og hvørjir lærarar verða?

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bleðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásett freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Pínir sjómansskatturin teg, so keyp oljuklæði og stivlar…

Sámal Jacobsen (y)
fiskimaður

Nú ilskast summi á landi aftur inn á skattin hjá sjómonnum. Teir verða skuldsettir fyri at skáka sær undan at bera sín lut av skyldunum móti samfelagnum. Loftið fyri tí upphædd, sum hjá sjómonnum verður serskattað, skal lækkast úr verandi 500.000 kr. niður í eitt nú 400 ella 300 tús.

Hetta er hvørki fyrstu ella neyvan heldur seinastu ferð, at henda øvundin ger seg galdandi. Neyvan lata tingmenn seg tó tøla til at broyta hesa gagnligu skattaskipan.

Fyrst nøkur orð um, hví lógin varð samtykt í 1997: Politikarar varnaðust, at føroyskir fiskimenn fóru heldur við útlendskum skipum, tí har fingu teir meiri burturúr. Noreg, Danmark og Ísland (onnur lond við) góvu sínum sjó- og fiskimonnum skattligar sersømdir fyri at samsýna teimum teirra serliga arbeiði.

Í Skotlandi bera sjómenn, sum eru meiri enn 180 dagar í sjónum um árið, lítlan og ongan skatt.

Uttan sersømdir í Føroyum var mitt í 90-árunum vandi fyri, at okkara fiskimenn fluttu við familju til grannalondini at búgva. So misti føroyski búskapurin bæði skattin og nýtsluna hjá familjunum hjá okkara fiskimonnum. Óli Jaocbsen var tá á tingi og í landsstýrinum. Anfinn Kallsberg, landsstýrismaðurin í figgjarmálum tá, legði lógina fyri løgtingið, sum samtykti sjómannaskattin við stórum meiriluta.

Tað var skilagott, tí henda skipan hevur gagnað Føroyum í ovurmát. Tað hevur m.a. við henni eydnast at tryggja lands- og kommunukassum optimala inntøku frá fiskivinnuni, tí vit behildu okkara góðu sjómenn. Teir veiða nevniliga rávøruna til 99% av landsins útflutningsvirði (upp ímóti 4 miljardum krónum um árið).

Síðan nøkur orð um, hvussu skipanin virkar:

Veruligi skattalættin hjá einum fiskimanni er ikki 15%, sum nógv halda, men max 7-8% av inntøkuni upp til hálva millión. Altso helvt at teim 15%, sum skattskylduga inntøkan verður lækkað í álíkningini. Fiskimenn fáa sostatt max uml. 35.000 kr. minni skatt um árið av hesi skipan. Men fáir koma so høgt upp. Tær fáu árshýrurnar (mest yvirmenn og menn við bestu skipum), sum liggja oman fyri 500.000 kr., verða skattaðir sum allar aðrar inntøkur í landinum. Fiskimenn høvdu árini fram til 2002 vaksandi inntøkur, tí fiskiskapur og fiskaprísir vóru góðir. Tá kom henda serskattaskipan væl við. Men nógv flestir fiskimenn komu heldur ikki tá í nánv av 1/2 mió. kr. um árið og fingu tískil ikki mest møguligan skattafrádrátt.

Farnu tvey árini eru hýrurnar falnar 20-40%. Skattalættin hjá sjómonnum er minkaður hareftir. Tað sansar at hjá mongum fiskimonnum og skipum at fáa endarnar at røkka saman nú.

Tað hevði verið ruðuleiki á arbeiðsmarknaðinum á landi, um limirnir í Føroya Arbeiðara-, Starvsmanna-, Lærara-, Heilsuroktar-, Magistara-, Búskapar- og løgfroðingafelag livdu undir líka óstøðugum lønarkorum, sum føroyskir fiskimenn.

Løgið, at øvundin skal sita so djúpt í teimum, sum nú aftur ilnast inn á sjómannaskattin. Hví hugsa tey ikki heldur um eitt nú:

– at fiskimenn eisini gjalda fyri, men brúka nógv minni landsvegir, musikk- og kvøldskúlar, sjónvarp, læknar, forsorg og øll hini tilboðini hjá landi og kommunum til aðrar borgarar?

– at fiskimenn gjalda tað sama sum onnur, men hava ikki sama rætt til at fáa úr ALS?

– at fiskimenn brúka nógvan pening til telefonsamrøður við konur og børn, meðan teir eru á sjónum

– ella at fiskimenn virka undir hørðum korum og á ótryggum arbeiðsplássum og eru burtur frá konu, børnum, heimi og kenningum langar tíðir av árinum meginpartin av lívinum?

Tingmenn skilja vónandi, at ein orsøk til, at fiskimenn nú bíta saman tenn og klára at liva við verandi lønarfalli, er júst, at sjómannaskatturin doyvir nakað pínuna av inntøkumissinum.

Til øll hini, sum enn øvunda fiskimonnum einar tvær ferðir tíggju túsund krónur minni skatt um árið, eru bert eini ráð: Keypið tykkum oljuklæði og gummistyvlar og farið til skips. Kanska vóru tit skjótari í land aftur, tí tit halda ikki, at hesi vátu, skitnu, buldrandi og rull andi arbeiðspláss eru verd tann lítla skáa í skatti, sum fiskimenn fáa.

Tað mátti verið virðiligari mál hjá teim øvundsjúku at tala og virka fyri, at allir føroyskir skattgjaldarar fáa eina ella helst fleiri ferðir 7-8% minni í skatti. Vit fiskimenn hødvu ikki øvundað tykkum henda lætta, og vit skulu eisini stuðla tykkum at røkka hesum máli.

Grønt afturstig

Leivur Hansen

Fryktandi er fyri, at nýggju reglurnar fyri ruskmóttøku á Endurnýtsluni á Sandvíkarhjalla, sum koma í gildi 1. september, kunnu koma kommununi aftur um brekku.

Sambært reglunum, sum heilsu- og umhvørvisnevndin hjá býráðnum hevur samtykt, fer nú bert at bera til hjá privatfólki at sleppa av við rusk leygardag.

Vanligar gerandisdagar verður bert tikið ímóti vinnuligum burturkasti.

Higartil hava privatfólk sloppið av við burturkast allar dagar - hósdag enntá til kl. 20. Men nú verða borgararnir í kommununi noyddir at savna sær ruskið saman til leygardag, um teir ikki skulu gjalda fyri at sleppa av við tað.

Hugsast kann, at hetta fer at økja um bíðirøðina á Sandvíkahjalla og harvið minka um áhugan fyri hesum tilboði, soleiðis at fólk aftur fara at freistast at velja ta lættastu loysnina: at blaka ruskið frá sær bara onkunstaðni - til miklan ampa bæði fyri umhvørvi og náttúru.

Og tá er lítið vunnið!

Endamálið hjá undanfarna býráði við at taka av gjaldið fyri burturkast frá privatfólki var júst at sleppa undan hesum tá alsamt vaksandi trupulleika - og tað eydnaðist, tíbetur.

Tí haldi eg tað ikki vera serliga væl umhugsað av heilsu- og umhvørvisnevndini nú aftur at avmarka møguleikarnar hjá borgarunum at sleppa av við húsarhaldburturkast.

Somuleiðis tykir tað mær løgið, at gjald nú verður lagt á slíkt burturkast aðrar dagar enn leygardag, tá breið semja annars var í býráðnum undir viðgerðini í fjørheyst av figgjarætlanini fyri 2004, um ikki at fylgja áheitan frá umsitingini um hetta.

Áhugavert kundi í hesum sambandi verið at fingið upplýst, hvussu hetta hongur saman.

Tíverri er ikki lík til, at nøkur greið linja er í umhvørvispolitikkinum, sum heilsu- og umhvørvisnevndin leggur fyri dagin.

Fyrr í ár gjørdi hon eftir mín tykki eitt annað álvarsamt mistak, tá hon í sambandi við skipanina av nýggju ruskmóttøkuni á Sandvíkahjalla samtykti at taka av árligu almennu ruddingardagarnar í kommununi við teirri grundgeving, at brúk ikki longur var fyri teimum.

Hetta var stórt spell, tí hetta fyrimyndarliga tiltak var vorðin ein siðvenja, sum borgararnir av fullum huga tóku undir við - samstundis sum hetta eisini var eitt fráslíkt høvi hjá bæði ungum og eldri í ymsu býlingunum at brúka ein dag í felag at hjúkla um umhvørvi og náttúru umframt at njóta eina góða løtu saman.

Skerdu møguleikarnir at sleppa av við húsarhalsburturkast og avtøkan av ruddingardøgunum eru sostatt eftir mínum tykki onki minni enn eitt stórt, grønt afturstig fyri kommununa.

EM fyri seyðahundar

Føroysk luttøka í stórstu seyðahundakapping í Europa "Continental 2004"

SEYÐAHUNDA-KAPPING
tíðindaskriv

Aftur í ár eru føroyingar við í størstu seyðahundakappingum í Europa, ið verður nú um vikuskifti..

Kappingin verður hildin í býnum Zwolle í Hollandi, har 79 hundar fara at kappast. Teir eru úr Føroyum, Danmark, Svøríki, Norra, Finnaland, Týskaland, Belgia, Frakland, Italia, Eysturríki, Sveis, og vertslandinum Holland.

Teir, sum umboða Føroya, eru Absalon Hansen við Jim og Eyðstein Jensen við Ben. Seinasta ár luttóku føroyingar eisini, og tá var tað um reppi at vit fingu eitt finalupláss, tað restaði bert 3 stig hjá Eyðsteini og Ben at koma í finaluna.

Ein tílík kapping er sera kostnaðarmikil og uttan stuðul frá MBM, Mærsk Air, Shell, og Norðbil. og øðrum hevði tað ikki verði møguligt hjá Føroyum at luttikið.

Innleiðandi umføringi vera fríggjadagin og leygardagin, og finalan verður sunnudagin, har 15 teir bestu frá teimum innleiðandi umførunum skulu kappast.

Í teimum innleiðandi umførunum skulu hundarnir heinta 5 seyðir, ið standa 400 metrar frá manninum og megna at reka seyðin um leið 850m. Í finaluni skulu teir í tveimum førum heinta 10 seyðir, ið standa 750 m frá.

Føroyingarnir fóru avstað hósdagin 26. august og koma aftur við Mærsk-Air mánadagin 30 august.